# Rendi á trý skip

**Tá ið grønlendski trolarin Salleq 2. hvítusunnumorgun kom á Havnina, rendi skipið á trý skip, ið lógu við bryggju. Ill-gruni er um, at skiparin á Salleq var ávirkaður**

SKIPSÓHAPP

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Nakað eftir at Salleq hevði rent á Mýling, Morgunroðan og Carinu, legði grønlendski trolarin at bryggju við hjálp frá pressaranum hjá Tórshavnar Skipasmiðju.*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Tað var tíðliga 2. hvítusunnumorgun, at Salleq kom á Havnina. Eftir øllum at døma misti skipið stýringina, og við stórari ferð var rent á trolaran Mýling úr Havn, umframt Carinu og Morgunroðan, ið øll lógu við bryggju.

### Mýlingur fekk stóran skaða

Bæði Carina og Morgunroðin blivu kroyst inn móti bryggjuni og fingu skaða, men tey fóru tó ikki at leka. Verri var við Mýlingi, sum fekk eitt stórt hol á skrokkin, og harumframt er onnur síðan kroyst inn. Mýlingur lak illa, og Tórshavnar Sløkkilið fór beinan vegin undir at pumpa sjógv úr skipinum.

Holið á skrokkinum á Mýlingi er slakar tveir metrar høgt, og ein hálvan metur breitt. Neyðugt var hjá Brimli at koma inn og taka yvir frá Sløkkiliðnum Ætlanin var at taka Mýling upp á beding seinnapartin mánadagin, men tá ið skipið var á veg upp á turt, slitnaði veirurin á bedingsvognunum, og tí sleppur Mýlingur neyvan upp á turt fyrr enn seint týskvøldið ella mikumorgunin, tá ið vognurin er umvældur.

Holið á Mýlingi er frammalaga á skipinum, og tí er vatn ikki komið í lastina. Hetta ger, at skipið flýtur, og sum støðan er nú, tekur skipið ikki meiri sjógv inn.

### Blóðroynd tikin av skiparanum

Eftir óhappið 2. hvítusunnumorgun kom Pressarin hjá Skipasmiðjuni grønlendska trolaranum Salleq til hjálpar, og skipið kom inn uttan trupulleikar. Salleq hevur fingið nakað av skaða, men skipið lak tó ikki.

Løgreglan var á staðnum, og blóðroynd var tikin av skiparanum á grønlendska trolaranum, tí løgreglan metti, at hann var ávirkaður.

Tað er tó enn ikki greitt, um rúsdrekka var beinleiðis orsøk til ásiglingina, ella um orsøkin var onkrir tekniskir trupulleikar umborð á Salleq.

Úrslitið av blóðroyndini er ikki komið enn, og enn er ikki ásett, nær sjóforhoyr verður í málinum.



*Løgreglan fór umborð á grønlendska trolaran, og blóðroynd var tikin av skiparanum, tí løgreglan metti, at hann var ávirkaður.*

*Mynd: Niels Uni Dam*

## Sjáldsama friðarligt

Hvítusunnan hevur verið sjáldsama friðarlig í Havn, upplýsir vakthavandi á politistøðini í Havn.

Nógv fólk hevur verið í býnum, men tey hava skikkað sær fyrimyndarligt. Eingin er tikin fyri rúsdrekkakoyring, og løgreglan hevur heldur onga fráboðan fingið um nakað harðskapsmál um halguna.

Vakthavandi sigur, at løgreglan hevur havt sera lítið at gjørt um vikuskifti, og tað er sjálvssagt gleðiligt.

**tn**

## Stjól 4-mannafar

Leygarmorgunin fekk løgreglan eina fráboðan frá Havnarskrivstovuni í Havn um, at ein persónur hevði tikið eitt 4-mannafar og róði við bátinum á vágni.

Maðurin fór úr bátinum við Kongabrúnna, har hann fór úr bátinum uttan at binda hann. Løgreglan kom á staðið og fekk fatur á bátinum aftur, og maðurin bleiv eisini handtikin í miðbýnum um sama mundi. Maðurin var dýrandi fullur, verður upplýst av politistøðini í Havn, og hann kann nú vænta at verða ákærdur fyri brúkstjóvarí og brot á sjólógina.

**tn**

## Rendi á Vilma

Fríggjakvøldið var eitt lítið ferðsluóhapp í miðbýnum í Havn. Eingin mansskaði var, tá ið ein bilur rendi á handilin hjá Vilmu í N. Finsensgøtu, men bilurin fekk tó ein rættuligan snudd.

**nud**

# Bedingsmeistarin leyp á bláman

**Veirurin á bedingsvogninum slitnaði, tá ið menn vóru við at fáa Mýling upp á beding mánadagin, bedingsmeistarin noyddist at leypa á bláman**

BEDINGSÓHAPP

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Týsmorgunin vóru menn hjá Tórshavnar Skipasmiðju við at seta ein nýggjan veir á bedingsvognin, so at teir kundu fáa Mýling upp á turt og tetta holið í skipinum.*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Tá ið menn frá Tórshavnar Skipasmiðju mánadagin vóru í ferð við at fáa Mýling upp á beding at hyggja at skaðanum, sum skipið hevði fingið, eftir at grønlendski trolarin Salleq hevði rent á tað, hendi eitt óhapp, sum tíbetur spældi væl av.

### Ikki hent áður

Tá ið veirurin slitnaði, fór bedingsvognurin við Mýlingi á bláman, og bedingsmeistarni noyddist at leypa á sjógv.

Tíbetur var vognurin ikki komin so langt niðan, og Mýlingur var ikki leysur úr sjónum, tá ið veirurin slitnaði.

Stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Gunnar Mohr, ið vit tosaðu við týsmorgunin, sigur, at tað er ongantíð áður komið fyri, at veirurin á bedingsvogninum er slitnaður.

- Vit arbeiða í løtuni við at fáa bedingsvognin í gongd aftur, og í løtuni eru froskmenn í holt við at skifta veirin, greiðir Gunnar Mohr frá.

Hann dugir tó ikki at siga, nær tað fer at bera til at fáa Mýling upp á turt aftur, men tað verður neyvan fyrr enn seint týsdagin, at vognurin fæst at virka aftur. Spurdur um skaðan, ið Mýlingur hevur fingið, sigur Gunnar Mohr, at tað ber ikki til at meta um skaðan enn, tí skipið ikki er komið upp á turt.